


*Her verða nú ongar postsmogur longur*

# Postsmogurnar hvørva í miðbýnum

**Fyrst í februar verða ongar postboksir longur í miðbýnum í Havn og á Argjum. Allar verða fluttar á Óðinsdeild**

Randi Jacobsen

Fleiri handlar og fyritøkur í Havn hava postboks í miðbýnum, og dagurin hjá fleiri handilsfólkum og starvsfólkum byrjar við at fara eftir posti í postsmoguni í húsinum, sum áður var posthús.

Men nú noyðast hesi fólk at broyta sínar vanar.

Posta boðar frá, at fyrst í februar verða postsmogurnar í miðbýnum og á Argjum allar fluttar á Óðinshædd.

Annars kunnu fyritøkurnar við postsmogu tekna vinnuhald, ið er útkoyring og heinting av posti. Posta átekur sær at tøma postsmogurnar og koyra postin út fyrrapart ella seinnapart alt eftir tørvi. Samstundis tekur Posta ímóti postinum frá teimum fyritøkunum og avgreiðir hann.

# Treytað revsing fyri hóttanir

**Ein maður varð í Føroya rætti í seinastu viku dømdur 30 daga treytaða fongsulsrevsing fyri at hava hótt tvey fólk við lívinum**

Randi Jacobsen

Ein maður var í rættinum í seinastu viku ákærdur fyri at hava hótt onnur fólk og fyri herverk.

Hann hevði í trímggjar mánaðir í fjør hótt tvey fólk fleiri ferðir við lívinum. Annar persónurin varð hóttur bæði við sms-um, í telefon og andlit til andlits, og boðini vóru "tú eigur at vera bangin", "tú livir ikki árið út", "hann skal hava jarn í øllum kroppinum, eg havi keypt fólk til uppgávuna, ein, sum eitur NN við sjefara, "eg buki og knúsi teg sundur í fleiri petti".

Við hitt fólkið segði tann ákærdi "nú er kríggj, eg buki (tann fyrr nevnda), so hann ikki er at kenna aftur, "eg havi tikið øll vápn í nýtslu og sett øll fólk til reiðar til kríggj.

Hesar hóttarnir fingu tey bæði hóttu fólkini til at bera ótta fyri lívi og heilsu.

Tann ákærdi noktaði seg sekan, men tvær telefonsamrøður við hóttanum vóru bandaðar. Tí hjálpti tí ákærda litið at nokta seg sekan.

Rætturin dømdi mannin sekan í hóttanunum. Hann varð eisini dømdur fyri herverk.

Líkt er til, at tann ákærdi síðan hevur lagt sítt lív um, tí maðurin slal við 30 daga treytaðari fongsulsrevsing. Hann má bara ikki gera nakað revsivert tvey tey næstu árini.

# Kjak



Heri Mohr

## Nýtt atlas

Í 1993 fingu vit føroyskt heimsatlas, og nú 17 ár eru liðin, ger Føroya Skúlabókagrunnur fyrireikingar til nýtt atlas. Ætlandi er talan um dagføring av tí fyrra, tí so nógv hava hesi 17 árini hóast alt ikki broytt heimin. Hetta átti at verið góð tíðindi, men so tykist ikki at vera. Nú er komið alment fram, at tað nýggja atlassið verður í somu leistum, sum brúktir vórðu til heimsatlassið, sum í roynd og veru er óskikkað til undirvísing í skúlunum. Tað hevur longu gjørt meira skaða enn gagn. Tann størsta miseran við atlassinum er, at altjóða landa- og staðarnøvn eru broytt til "føroyska tungu." Dømi úr rúgvuni: New Zealand til Nýsæland, New Foundland til Nýfundland, men hví New York ikki er broytt til Nýjork og New Delhi ikkki til Nýdeli er ikki lætt at skilja; Stokkhólmur við Stockholm í parentes, um onkur skuldi ivast o.s.fr.

Í skúlunum lærdu vit, at tað stóra havið í Fjarðeystri æt Stillahav. Ikki so løgið, tí á enskum eitur havið Pacific (Ocean), sum merkir stilli, kvirra. Men í Føroyum tykist navnið nú at vera broytt til Kyrrahavið. Tá ið vit siga, at sjógvur kyrrar, hugsa vit vanliga um havið inni við land. Stilli ella kvirra hevu einki við kyrru at gera.

Nógv er skrivað og nógv er tosað um atlassið, eisini á tí politiska pallinum. Í seinastu viku skrivaði Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, eina sera áhugaverda grein í bløðunum júst um hetta álvarsmál.

Tá tað kann lata seg gera hjá einum almennum stovn (við almennum peningi) at órógva so álvarsligt í okkara skúlum, hvat verður so tað næsta, má vera loyvt at spyrja.

Vit kunnu ímynda okkum, at um nøkur ár fara vit at fáa eina glæstribók, útgivin av sama stovni, um føroysk mentafólk og teirra lív: Vensil Hammarheim, Sveinur Gruntvík, Jákup í Dali, Gudmundur Brúni, Lúi Sakariasson, Nikláі Mor, Janus Krisjan Svaba (Konto/Konta – heppið, at fyrra o´ið ikki broyttist til u), Páll F, Martin Jóannesarson, Rikar Langi, Jóan Heinrik Vetur Pálsson, Karl Jóan Janusarson o.fl.

Gamalt er, at navn spillur ongan mann. Men maður kann spilla navn – sum í hesum føri og í atlassinum.

Slíkar fløkjur og broytingar í landa- og staðarnøvnum, sum varð framt við okkara fyrsta heimsatlassi, má haldast at vera heilt burturvið. Vónandi tekur landsstýrið neyðug stig til tess, at serkøn hjálp við heimildum verður útvegað Skúlabókagrunninum í sambandi við útgávu av nýggjum atlassi, so at tað, sum hendi við heimsatlassinum, ikki kemur fyri í tí nýggja atlassinum.

Rolf Guttesen er serkønur í geografi og geologi. Hann átti at verið sjálvskrivaður til hetta arbeiðið.

Tað er ikki meira enn rímiligt, at skúlarnir (næmingarnir) fáa tað nýggja atlassið, framleitt við serkønari leiðslu, ókeypis treytað av, at heimsatlassið samstundis verður inndrigið og makulerað. Tá Perestroika tók seg upp í Russlandi fyri 20 árum síðani, vórðu allar tær ónýtiligu skúlabøkurnar burturbeindar, og aðrar komu í staðin fyri.



Bjørt Samuelsen
*løgtingskvinna*

## Húsakeyp og vantandi lóggáva

At keypa eini hús ella íbúð er hjá flestum okkara størsta fíggjarliga íløgan vit gera í lívinum. Í sendingini Skannarin hoyrdu vit um staka mammu, sum var komin sera illa fyri, tá hon keypti hús, og um hvussu átrokandi tað er at fáa lóggávu, sum skipar keyp og sølu av fastari ogn.

Rættarhjálpin viðgerð á hvørjum ári á leið 50 mál, ið snúgva seg um keyp og sølu av fastari ogn. Og hetta er øðiliga nógv, hugsa vit um avmarkaðu støddina á føroyska húsamarknaðinum.

Í fjør vár legði Tjóðveldi saman við Sjálvstýrinum fram uppskot til samtyktar at fáa landsstýrið sum skjótast at smíða og leggja fyri tingið alla neyðuga lóggávu kring keyp og sølu av fastari ogn og húsameklaravirksemi.

Slík lóggáva skal lýsa øll rættindi og allar skyldur hjá seljara, og skal soleiðis verja keyparar, so teir ikki koma út í slíkar støður, sum ræðusøguna vit hoyrdu um í Skannaranum. Lógin skal eisini staðfesta, hvørjar skyldur liggja á keyparanum sjálvum.

### Følsk trygd

Húsakeyp fara sum kunnugt í alsamt størri mun fram ígjøgnum meklarafyritøkur. Hetta átti at borga fyri størri brúkaratrygd, men ger tað ikki vegna væntandi lógarkrøv. Tvørturímóti kann keyparin fáa falska trygd, eitt nú við at hann fær ta fatan, at støðulýsing er gjørd av ognini, hóast lýsingin bert byggir á upplýsingar frá seljaranum sjálvum. Slíkar støðulýsingar kunnu vera verri enn einki. Til ber vanliga at keypa meira fakliga grundaðar støðulýsingar av ognini, men greið krøv eru heldur ikki til hesar støðulýsingar og ógreitt er, hvør ábyrgd fylgir slíkari.

Við lógini um fastognarkeyp kann verða ásett krav um trygging. Tað ber í sær, at seljari hjá einum tryggingarfelag stovnar trygging uppá, at húsini eru í einum ávísum standi. Tryggingarfelagið fer tá at seta ítøkilig krøv til støðulýsingarnar. Og sum vit vístu á í viðmerkingunum til okkara uppskot, so er keyp og søla av fastari ogn og meklaravirksemi væl skipað í okkara grannalondum. Tí átti at borið til væl og kvikliga at smíða líknandi føroyska lóggávu.

### Væl móttikið

Málið fekk eina sera góða viðgerð í Vinnunevndini. Uttan undantak vístu øll, sum komu í nevndina á, at hetta var sera harðliga tiltrongd lóggáva, og tey fegnaðust um, at málið var komið til viðgerðar í Løgtinginum. Kortini valdi samgongan at fella hetta andstøðuuppskot. Helst tí at landsstýrismaðurin segði, at hann var farin undir slíka lóggávu og fór at koma við lógunum sama heyst. Hetta frøddust vit sjálvandi um, men eru farin at ótolnast, nú skjótt eitt ár er runnið. Vónandi kann tað fokus, sum Skannarin hevur sett á málið, fáa ferð á, so lógin loksins kemur fyri tingið.